

## Dúgvan sigldi fram við

Strandfaraskipið Dúgvan flutti ein lítlan part av rennarunum úr Norðoyggjum um Leirvíksfjørð undan tiltakinum, men tey flestu nýttu høvi at koyra í bussi úr Klaksvík. Ferðirnar hjá Dúgvuni um Leivíksfjørð eru nú av álvara farnir at fækkast, og leygardagin verður sagt farvæl til farleiðina, sum hevur álitið hjá norðoyingum. Sunnudagin sigldi Dúgvan framvið tunnilsmunnanum í Leirvík og heilsaði teimum mongu fólkunum, sum vórðu savnað har.

# tunnilin



*Fleiri enn 3000 rennarar og gongufólk vóru við í renningini ígjøgnum Norðoyatunnilin sunnudagin, og tað var ein serstøk sjón, tá ið øll fólkini gjørdu seg til reiðar uttanfyri tunnilsmunnan í Leirvík*


## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






**Hvar er bólturin?**

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.